# Ringanna Harri til framløgu

**Hósdagin verður almenn framløga av bókini, Tey bæði Tornini. Hetta er næsta bókin í trilogiini hjá Tokien um Ringanna Harra**

BÓKAFRAMLØGA
*tíðindaskriv*

Tað er Axel Tórgarð, sum hevur týtt heimsgitnu skaldsøguna til føroyskt.

Høvundur J.R.R. Tokien. Hann varð føddur í Suðurafrika av bretskum foreldrum í 1892, men faðirin doyði og móðirin flutti aftur til Onglands tá sonurin var trý ára gamal. Hann vaks upp í trongum korum, men fekk góða skúlagongd og endaði við at gerast professari í angulsaksiskum máli. Hann slapp tó ikki undan at taka lut í fyrra heimsbardaga, og ræðuleikarnir í skotgrøvunum, tá hansara herur misti 60.000 mans í einum bardaga, var nakað sum aldrin fór honum úr minni.

Kunnleiki hansara til gamla enska málið og tey norrønu málini, sum vóru tí so lík, gav honum íblástur til rithøvundavirksemi. Fyrsta bók hansara var Hobbin, sum kom í 1937. Hon fekk so góða undirtøku, at forlagið vildi fáa hann at gera eitt framhald, og hann fór at skriva, men arbeiðið gjørdist so umfatandi, at árini gingu uttan at nakað kom frá honum. So kom hann við einum handriti til bókina Ringanna harra, sum var so stórt, at forlagið segði at tað mátti koma út í trimum táttum.

Fyrsti táttur kom út ólavsøkudag 1954 og fekk navnið Ringliðið. Annar táttur kom út mortansmessudag sama ár og fekk navnið Tey bæði tornini. Triði táttur kom út nærum eitt ár seinni, tann 20. oktober 1955.

Tað tók nøkur ár til sølan gjørdist stór av hesum bókum, men so var tað ikki við mýkindum! Hesin friðarligi professarin, sum í frítíð síni hevði havt hesa skriving til dagdvølju, gjørdist knappliga metsølurithøvundur, og fólk um allan heim fóru at lesa hesa bók. Heilt bilsin gjørdust hann og konan tá ein studentaskúlaklassi úr California setti upp tjøld síni beint við dyr teirra fyri at sleppa at síggja høvundan. Fyri tey ið ung vóru í sekstiárunum gjørdist bókin ein kultbók, og summi fingu sær enntá nøvn eftir persónum og støðum í bókini.

Men henda undirtøkan var ikki eitt upplop. Áhugin fyri bókini hevur staðið við og vaksið síðani, og eitt prógv fyri hesum er at teir tríggir filmarnir, sum gjørdir eru um hesa bók, hava verið nakrir av teimum, sum flest fólk hava sæð í heiminum.

Tá ið aldarskiftið var, vórðu fólk spurd hvørja bók tey hildu vera ta bestu sum skrivað var í farnu øld, og har kom Ringanna harri inn sum nummar eitt.

Tíðliga gjørdist Axel Tórgarð áhugaður í Tolkien. Hann sigur, at ein amerikumaður kom at búgva eitt skifti í Kvívík, og hann bað Axel lesa Hobban. Hann varð hugtikin av henni, týddi hana til føroyskt og las hana upp í útvarpinum. Í 1990 kom hon út. Tað var tó ikki fyrr enn nógv seinni at Axel fór at týða Ringanna harra. Týðingin av fyrsta tátti var liðug 30. oktober 2003, og í vár var øll týðingin liðug. Ringliðið kom út 18. desember 2003, nú kemur annar táttur, og ætlingin er, at triði táttur skal koma út næsta heyst.



*Bøkurnar hjá Tokien um Ringanna Harra hava eisini verið at sæð á hvíta løriftinum*




Leiðari til Serstovnadeildina

## Kanst tú leiða eitt sterkt lið

Tú ert áhugaður í korunum hjá menningartarnaðum í Føroyum. Tú hevur visjónir og evnini at leiða eitt sterkt lið av leiðarum. Tær dámar at bróta upp úr nýggjum, og tú megnar at gjøgnumføra broytingar

Ljóðar hetta sum tú? So er starvið sum leiðari fyri Serstovnadeildina kanska nakað fyri teg. Serforsorgarøkið stendur fyri broytingum, bæði á fakliga og fyrisitingarliga økinum, og tað krevur eitt gløgt høvd, analytisk evni og gott yvirlit.

Serstovnadeildin er skipað undir Heimarøktini og Serforsorgini. Hon fevnir um bústovnar, sambýli, verkstaðir og virknistilboð til vaksin menningartarnað. Virksemið er kring alt landið, og leiðarin hevur ábyrgd mótvegis stjóranum fyri Heimarøktini og Serforsorgini.

Serstovnadeildin umsitur fyri 80 milliónir krónur árliga, og tær fara til at reka 26 stovnar. 209 starvsfólk starvast í serforsorgini, og leiðarin fyri serstovnadeildina arbeiðir í tøttum samstarvi við 24 stovnsleiðarar, sum bygnaðarliga eru undir honum. Umframt Serstovnadeildina eru fýra aðrar deildir undir Heimarøktini og Serforsorgini, og tí gongur leiðarin inn í eitt kollektiv av leiðarum.

Serstovnadeildin skal broytast og bygnaðurin betrast. Leiðarin má tískil hava hegni og evni at koma fram til framtíðarloysnir og fremja tær í verki. Tað krevur millum annað, at tú dugir at skapa sambond og varðveita tey. Tú skalt vera savnandi og skapandi, tí einki verður framt uttan samstarv við onnur.

Serstovnadeildin er eitt dynamiskt arbeiðspláss, har eingin dagur er eins. Økið hevur stóran almennan áhuga, og tað er ein avbjóðing at liva upp til krøvini við teimum fíggjarligu kørmum, sum politiska skipanin setir. Tú fært ávirkan, kemur í samband við nógv fólk og hevur góðar møguleikar fyri eftirútbúgving.

Vit vænta, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving og starvsroyndir. Lønin hevur verið flokkað á 49. stigi í lønaravtaluni hjá Føroya Pedagogfelag.

Umsóknarfreistin er mánadagin 22. november 2004, og starvið verður sett sum skjótast. Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum skulu sendast til:

Heimarøktin og Serforsorgin
Att: Mary í Garði, stjóri
Eirargarður 2, 2. hædd
Postboks 3037
FO-110 Tórshavn

www.sansir.fo

Heimarøktin og Serforsorgin
Eirargarður 2, 2. hædd, Tel 304020, Fax 304010






*Stendur tað til lærarnar í Hoydølum, so verður eingin Miðnámsdepil bygdur við Marknagil*

# Lærarar mótmæla miðnámsdepli

**Á fundi hava lærararnir í Hoydølum viðgjørt ætlanina um ein miðnámsdepil við Marknagilsvegin. Niðurstøðan var greið. Ein stórur meiriluti av lærarunum tekur ikki undir við ætlanini**

MIÐNÁMSDEPIL
*Tíðindaskriv*

Í tíðindaskrivi til fjølmiðlarnar verður staðfest, at grundgevingarnar fyri støðuni hjá lærarunum í høvuðsheitum eru hesar.

### Stødd

Á Studentaskúlanum í Hoydølum ganga í løtuni umleið 500 næmingar, og talið fer óivað at vaksa komandi árini. Studentaskúlin er sosatt bæði við sínum næmingatali og sínum umleið 70 lærarum og vikarum ein ivaleysa stór eind. Ríkiligt grundarlag er bæði fyri lærugreinavalum, tvørfakligum samstarvi og størri tiltøkum sum sjónleikum, sangleikum og náttúrvísindaligum eins og samfelagsfrøðiligum verkætlanum. Samstundis er skúlin ikki so stórur, at lærarar og næmingar missa hvønn annan burtur. Hvør einstakur næmingur verður ein partur av umhvørvinum í Hoydølum og kann identifisera seg við virksemið á skúlanum.

Miðnámsdepilin kemur sambært álitinum frá bygginevndini at húsa 1200 næmingum, t.v.s verður 2-3 ferðir so stórur sum núverandi Studentaskúlin í Hoydølum. Hvussu stórur depilin verður um 15-20 ár, kunnu vit bara gita um. At tosa um synergi-effekt í hesum sambandi er burturvið. Vit skulu minnast til, at talan ikki er um eina framleiðslufyritøku, heldur ikki um ein granskingarstovn, men um ein útbúgvingarstovn fyri 15-20 ára gomul, og persónliga sambandið millum lærarar og næmingar hevur tí alstóran týdning. Kenslan hjá hvørjum einstøkum næmingi at hoyra til eitt ávíst stað og ein avísan flokk við serligum identiteti er avgerandi fyri trivnaðin. Sjálvsagt kunnu og skulu lærarar frá ymsum skúlum samstarva og fáa íblástur hvør frá øðrum, men at so nógvir næmingar sum gjørligt verða savnaðir saman á einum stað gevur ikki eina synergi-effekt. Tvørturímóti kann tað at føra til fremmandagerð.

### Undirvísing

Sambært álitinum frá bygginevndini er ætlanin at samansjóða miðnámsútbúgvingarnar, og m.a. fáa felags undirvísing í avísum lærugreinum, t.d. føroyskum, enskum og støddfrøði. Samstundis verður í einum skrivi frá Mentamálaráðnum, dagfest 05.10.04, víst á ætlaðar broytingar í núverandi miðnámsútbúgvingum, soleiðis at byrjað verður við einum støðisári. Hetta er eftir okkara tykki tað sama sum at flyta fólkaskúlan inn í miðnámsútbúgvingarnar. Tekniski skúli, Handilsskúlin og Studentaskúlin rekruttera rættiliga ymiskar næmingar, og tá tey 9-10 árini í fólkaskúlanum eru liðin, leingjast næmingarnir eftir at sleppa hvør sína leið, at sleppa at velja eftir evnum og áhuga. At tvinga næmingarnar framhaldandi at verða saman fer bert at føra til trupulleikar, og stórur vandi er fyri, at fakliga støðið í fleiri lærugreinum fer at lækka.

### Umsiting

Leiðslan á Studentaskúlanum í Hoydølum er í dag ein rektari og 2 inspektorar. Á Miðnámsdeplinum verða umframt núverandi leiðslur á skúlunum ein felags depilsleiðari og eitt depilsráð. Sostatt koma 2 umsitingarlig løg omaná tey, sum skúlarnir í dag hava. Tað stendur ikki útgreinað í álitinum, hvørjar uppgávur og heimildir depilsleiðarin og depilsráðið skulu hava, men greitt er, at tað verður mundandi longri frá hvørjum einstøkum lærara og næmingi til ovastu leiðslu, og ein meiri fleksiblan skúla verður neyvan talan um.

### Studentaskúlin ein sjálvstøðug eind

Sum heild tykist Miðnámsdepilin tískil ikki vera nakað framstig sammett við núverandi studentaskúlaskipan. Tvørturímóti. Flestu lærarar halda, at ætlanin kann føra til eina fakliga nivellering, og at sereyðkennini hjá studentaskúlanum fara at hvørva.

Tíverri hevur tað sermerkt arbeiðsgongdina í sambandi við Miðnámsdepilin, at lærararnir stórt sæð ikki hava verið kunnaðir. Álitið frá bygginevndini varð ikki almannakunngjørt fyrr enn 27.09.04, t.v.s. beint undan heystfrítíðini, og framvegis eru signalini frá Mentamálaráðnum ógreið. Tað er tó at frøast um, at mentamálaráðharrin hevur sett sær fyri at gera nakað við hølistrupulleikarnar, sum miðnámsskúlarnir dragast við. Í nógv ár hevur verið sera trongligt í Hoydølum, og út- ella nýbygging er tí atrokandi neyðug. Men fyri okkum er heilt avgerandi, at studentaskúlin verður varðveittur sum sjálvstøðug faklig og pedagogisk eind.

# Nýggir DR-prísir á Canal Digital

**Nýggja avtalan inniber, at samsvar verður millum prísirnar fyri DR-rásirnar hjá Televarpinum og Canal Digital**

SJÓNVARP
*Tíðindaskriv*

Tey, sum hava parabolmóttakarar við Canal Digital korti í, kunnu nú síggja fram til eina munandi príslækking fyri DR-rásirnar. Hetta er avleiðing av avtaluni, sum Televarpið herfyri gjørdi við Danmarks Radio, og sum alt fyri eitt fekk Canal Digital at krevja somu sømdir fyri sínar kundar.

Eitt nú inniber nýggja avtalan, at DR-rásirnar nú verða lagdar afturat øllum ráspakkum hjá Canal Digital.

– Hetta er ein avtala, sum vit eru errin um, tí hon mekir, at allir kundar okkara í Føroyum fáa atgongd til DR1 og DR2, uttan at tað kemur at kosta teimum nakað, sigur Peter Fredsted From, sum er sølustjóri hjá Canal Digital.

– Det er en aftale, som vi er meget stolte af, for den betyder, at alle vores parabol-kunder på Færøerne får adgang til DR1 og DR2, uden det kommer til at koste dem ekstra, siger salgschef Peter Fredsted From fra Canal Digital.

– Nú er avtalan júst komin í lag, so tey, sum undan hesum hava DR-rásirnar við í sínum pakka, mugu kortini gjalda fulla rokning fyri november mánað. Eftirfylgjandi verða kundarnir tó góðskrivaðir fyri hetta, so tað er ikki soleiðis, at tey koma at rinda meira, enn tey annars vildu gjørt, leggur sølustjórin afturat.